Ognarfelag
Tryggingartakaranna

Hálvársfrásøgn 2026

Interim Report 1H 2026



Innihaldsyvirlit

Table of contents

Samtaksyvirlit 4
Group Chart

5 ára yvirlit 5
Five year Summary

01
Leiðslufrágreiðing 11
Management Review

02
Rakstrarroknskapur 18
Income Statement

Fíggjarstøða 19
Balance sheet

Uppgerð av broyting í eginogn 21
Statement of Changes in Equity


Solvensuppgerð 23
Statement of Solvency

03
Notur 25
Notes

04
Leiðsluátekning 36
Statement by the Management

Partafelagsupplýsingar 37
Company Information

Samtaksyvirlit / Group Chart



5 ára yvirlit *(Samtak)* / Five year summary *(Group)*

DKK 1.000	1H 2026	1H 2025	1H 2024	1H 2023	1H 2022
Rakstur / Income Statement					
Rentu- og ómaksgjøld netto / Net interest income and fee income	292.419	291.886	318.341	262.019	171.381
Tryggingjøld og skaðaendurgjøld fyri egna rokning netto / Premium income and Claims, net of reinsurance	136.660	96.500	31.813	89.043	91.417
Virðisjavnan / Fair value adjustments	45.780	-22.398	76.398	30.412	-200.584
Aðrar vanligar inntøkur / Other operating income	7.457	7.062	9.503	3.732	12.059
Útreiðslur til starvsfólk og umsiting / Staff costs and adm. expenses	-197.388	-187.936	-179.130	-164.994	-161.132
Aðrar útreiðslur / Other expenses	-4.232	-2.723	-2.803	-3.087	-3.017
Niðurskrivingar av útlánum og aðrari ogn / Impairment of loans advances, receivables etc.	24.648	15.116	1.978	10.742	-3.619
Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum / Income from associated and subsidiary undertakings	4.002	3.848	4.208	4.957	9.171
Úrslit áðrenn skatt / Profit/loss (-) before tax	**309.345**	**201.357**	**260.309**	**232.824**	**-84.326**
Skattur	-54.045	-34.627	-45.619	-41.075	15.999
Úrslit / Net profit/loss (-)	**255.300**	**166.730**	**214.690**	**191.750**	**-68.327**
Fíggjarstøða / Balance Sheet					
Ogn / Assets					
Kassapeningur og áogn í lánistovnum og tjóðbankum / Cash in hand, claims on central banks and credit institutions	1.291.422	1.366.192	1.468.359	1.049.032	1.172.549
Útlán og onnur ogn / Loans and other advances	9.698.893	9.082.420	8.176.817	7.868.403	7.102.766
Onnur ogn / Other assets	8.490.436	7.839.155	7.124.682	6.597.345	6.173.843
Ogn tilsamans / Total assets	**19.480.751**	**18.287.767**	**16.769.859**	**15.514.780**	**14.449.158**
Skuld / Liabilities					
Skuld til lánistovnar og tjóðbankar / Debt to credit institutions and central banks	15.819	135.424	38.616	31.235	19.511
Innlán og onnur skuld / Deposits and other liabilities	10.794.840	10.350.559	9.528.010	9.071.027	8.267.922
Onnur skuld / Other liabilities	3.745.262	3.294.182	3.002.434	2.557.658	2.542.336
Eginpeningur / Equity	4.924.829	4.507.602	4.200.797	3.854.861	3.619.389
Skuld tilsamans / Total liabilities	**19.480.751**	**18.287.767**	**16.769.859**	**15.514.780**	**14.449.158**
Lyklatøl / Key Ratios					
Solvensur og kapitalur / Solvency and capital ratios					
Solvensprosent / Total capital ratio	39,7%	36,4%	37,0%	33,9%	33,7%
Kjarnukapitalprosent / CET1 ratio	39,7%	36,4%	37,0%	33,9%	33,7%
Vinningur / Earning ratios					
Hálvársrenting av eginogn áðrenn skatt / Half-year return on equity before tax	6,4%	4,5%	6,3%	6,2%	-2,3%
Hálvársrenting av eginogn aftaná skatt / Half-year return on equity after tax	5,3%	3,7%	5,2%	5,1%	-1,9%
Inntøka pr. útreiðslukrónu / Income/Cost ratio	2,7	2,2	2,4	2,5	0,5
Ognaravkast / Return on assets	1,3%	1,1%	1,5%	1,5%	-0,6%
Marknaðarváði / Market risk ratios					
Rentuváði / Interest rate risk	0,7%	0,6%	0,6%	0,9%	0,9%
Gjaldoyrastøða / Foreign exchange position	5,2%	5,1%	5,4%	5,2%	7,9%
Gjaldoyraváði / Foreign exchange risk	0,1%	0,1%	0,0%	0,0%	0,1%
Gjaldføri / Liquidity ratios					
Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán / Loans, advances and impairments in proportion to deposits	92,1%	90,2%	88,2%	89,2%	88,6%
Lánsváði / Credit risk ratios					
Stór viðskifti í mun til grundkapital / Large exposure as percentage of capital base	66,5%	68,7%	64,9%	67,9%	63,1%
Tap og niðurskrivingar í tíðarskeiðnum í prosentum / Write-offs and impairments during the period	-0,2%	-0,1%	0,0%	-0,1%	-0,1%
Útlán í mun til eginognina / Total loans in proportion to equity	2,0	2,0	1,9	2,0	2,0,
Útlánsvøkstur / Increase of loans	5,1%	5,8%	0,4%	3,8%	3,8%

5 ára yvirlit *(Móðurfelag)* / Five year summary *(The parent company)*

DKK 1.000	1H 2026	1H 2025	1H 2024	1H 2023	1H 2022
Rakstur / Income Statement					
Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum / Income from associated and subsidiary undertakings	255.300	166.730	214.690	191.750	-68.327
Úrslit áðrenn skatt / Profit/loss (-) before tax	**255.300**	**166.730**	**214.690**	**191.750**	**-68.327**
Skattur	0	0	0	0	0
Úrslit / Net profit/loss (-) for the year	**255.300**	**166.730**	**214.690**	**191.750**	**-68.327**
Fíggjarstøða / Balance Sheet					
Ogn / Assets					
Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum / Investments in subsidiaries	4.924.829	4.507.602	4.200.797	3.854.861	3.619.389
Ogn tilsamans / Total assets	**4.924.829**	**4.507.602**	**4.200.799**	**3.854.861**	**3.619.389**
Skuld / Liabilities					
Eginpeningur / Equity	4.924.829	4.507.602	4.200.797	3.854.861	3.619.389
Skuld tilsamans / Total liabilities	**4.924.829**	**4.507.602**	**4.200.797**	**3.854.861**	**3.619.389**
Lyklatøl / Key ratios					
Solvensur og kapitalur / Solvency and capital ratios					
Solvensprosent / Total capital ratio	79,3%	78,4%	75,1%	72,7%	79,0%
Kjarnukapitalprosent / CET1 ratio	79,3%	78,4%	75,1%	72,7%	79,0%
Vinningur / Earning ratios					
Hálvársrenting av eginogn áðrenn skatt / Half-year return on equity before tax	5,3%	3,7%	5,2%	5,1%	-1,9%
Hálvársrenting av eginogn aftaná skatt / Half-year return on equity after tax	5,3%	3,7%	5,2%	5,1%	-1,9%

5 ára yvirlit *(Skaðatrygging)* / Five year summary *(Non-life insurance)*

DKK 1.000	1H 2026	1H 2025	1H 2024	1H 2023	1H 2022
Rakstur / Income Statement					
Bruttotryggingargjøld / Gross written premiums	273.607	279.443	268.951	247.325	231.594
Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims	-120.536	-194.482	-254.000	-153.682	-142.352
Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi í alt / Total operational expenses	-42.298	-39.362	-39.817	-36.380	-34.803
Úrslit av endurtrygging / Reinsurance result	-43.030	-7.785	7.200	-16.631	-8.201
Tryggingartekniskt úrslit / Technical result	65.100	34.431	-16.885	41.949	45.561
Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after tech. Interest rate income	25.554	7.247	40.790	19.702	-95.586
Úrslit / Net profit	76.103	34.176	21.572	50.700	-40.315
Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Result from net claims provisions	-3.136	-21.879	-24.497	12.609	4.636
Fíggjarstøða / Balance Sheet					
Tryggingartekniskar avsetingar tilsamans / Total technical provisions	598.582	569.989	526.259	482.332	615.557
Tryggingaráogn tilsamans / Total insurance assets	21.071	50.883	25.814	42.649	160.005
Eginpeningur / Equity	868.706	782.736	711.298	740.426	649.411
Ogn tilsamans / Total assets	1.531.998	1.405.440	1.276.947	1.254.335	1.338.095
Lyklatøl / Key ratios					
Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio	44,9%	71,0%	95,4%	62,5%	61,9%
Bruttokostnaðarprosent / Cost ratio	15,8%	14,4%	15,0%	14,8%	15,1%
Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio	16,0%	2,8%	-2,7%	6,8%	3,6%
Combined ratio / Combined ratio	76,7	88,2	107,6	84,1	80,6
Operating ratio / Operating ratio	76,0	87,5	106,3	83,1	80,3
Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum / Relative effect on provisions	7,9	-5,5	-10,1	4,4	1,5
Renting av eginogn aftaná skatt / Return on equity after tax	8,9%	4,4%	2,9%	7,0%	-5,6%
Solvensdekningur / Solvency	290%	281%	265%	320%	313%

5 ára yvirlit *(Lívstrygging)* / Five year summary *(Life insurance)*

DKK 1.000	1H 2026	1H 2025	1H 2024	1H 2023	1H 2022
Rakstur / Income Statement					
Tryggingargjøld / Premiums written	126.744	119.570	113.981	98.905	92.067
Útgoldnar veitingar / Benefits paid	-50.623	-33.161	-36.510	-47.037	-27.961
Úrslit av íløguvirksemi / Investment result	162.808	-16.974	101.482	48.846	-166.765
Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi / Total operational expenses	-10.471	-8.320	-8.001	-7.756	-7.511
Úrslit av endurtrygging / Reinsurance result	-588	-636	-618	-551	-539
Tryggingartekniskt úrslit / Technical result	3.760	5.873	3.775	-1.141	3.979
Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging / Technical result health and accident insurance	3.373	-760	-660	24	-986
Úrslit / Net profit	6.869	3.388	2.818	-2.551	-3.598
Fíggjarstøða / Balance Sheet					
Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur / Insurance and investment agreement provisions	2.752.084	2.346.826	2.113.363	1.806.289	1.648.428
Eginpeningur / Equity	90.586	79.933	74.504	68.565	77.710
Ogn tilsamans / Total assets	2.848.436	2.435.126	2.193.466	1.880.117	1.732.844
Lyklatøl / Key ratios					
Avkastpst. knýtt at marknaðarrentuproduktum / Return from market related products	6,7%	-0,4%	5,4%	3,3%	-9,4%
Váði á avkasti knýtt at marknaðarrentuproduktum / Risk on return from market related products	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan / Expense per policyholder in DKK	461 kr.	380 kr.	371 kr.	361 kr.	357 kr.
Kostnaðir í % av avsetingum / Expense ratio to provisions	0,4%	0,4%	0,4%	0,4%	0,4%
Hálvársrenting av eginogn aftaná skatt / Half-year return on equity after tax	7,6%	4,2%	3,8%	-3,7%	-4,6%
Solvensdekningur / Solvency	275,0%	256,0%	270,0%	248,8%	282,0%

5 ára yvirlit *(Peningastovnur)* / Five year summary *(Bank)*

DKK 1.000	1H 2026	1H 2025	1H 2024	1H 2023	1H 2022
Rakstur / Income Statement					
Rentu- og ómaksgjøld netto / Net interest income and fee income	260.201	261.589	285.460	243.985	159.333
Virðisjavnan / Fair value adjustments	5.859	12.121	18.740	6.409	-41.768
Aðrar vanligar inntøkur / Other operating income	1.245	609	1.049	603	793
Útreiðslur til starvsfólk og umsiting / Staff costs and administrative expenses	-119.042	-114.574	-111.133	-102.372	-97.812
Aðrar útreiðslur / Other expenses	-1.526	-1.252	-1.267	-1.674	-1.647
Niðurskrivingar av útlánum og aðrari ogn / Impairment of loans advances, receivables etc.	20.478	15.149	8.717	10.892	-3.422
Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum / Income from associated and subsidiary undertakings	4.720	4.379	4.672	4.725	5.287
Úrslit áðrenn skatt / Profit/loss (-) before tax	**171.935**	**178.020**	**206.239**	**162.569**	**20.763**
Skattur	-30.948	-32.044	-37.123	-29.262	-3.733
Úrslit / Net profit/loss (-)	**140.987**	**145.976**	**169.116**	**133.306**	**17.030**
Fíggjarstøða / Balance Sheet					
Ogn / Assets					
Kassapeningur og áogn í lánistovnum og tjóðbankum / Cash in hand, claims on central banks and credit institutions	1.284.436	1.349.763	1.461.953	1.021.785	1.173.438
Útlán og onnur ogn / Loans and other advances	9.668.281	9.078.512	8.172.988	7.793.680	7.096.807
Onnur ogn / Other assets	3.083.808	3.121.683	2.805.428	2.792.560	2.355.478
Ogn tilsamans / Total assets	**14.036.526**	**13.549.957**	**12.440.369**	**11.608.025**	**10.625.724**
Skuld / Liabilities					
Skuld til lánistovnar og tjóðbankar / Debt to credit institutions and central banks	15.819	135.424	38.616	31.235	19.511
Innlán og onnur skuld / Deposits and other liabilities	10.887.215	10.488.640	9.659.140	9.207.608	8.407.956
Onnur skuld / Other liabilities	295.178	305.532	308.651	217.068	235.659
Eginpeningur / Equity	2.838.314	2.620.360	2.433.962	2.152.115	1.962.597
Skuld tilsamans / Total liabilities	**14.036.526**	**13.549.957**	**12.440.369**	**11.608.025**	**10.625.724**
Lyklatøl / Key Ratios					
Solvensur og kapitalur / Solvency and capital ratios					
Solvensprosent / Total capital ratio	39,6%	34,1%	34,7%	31,1%	29,5%
Kjarnukapitalprosent / CET1 ratio	39,6%	34,1%	34,7%	31,1%	29,5%
Vinningur / Earning ratios					
Hálvársrenting av eginogn áðrenn skatt / Half-year return on equity before tax	6,2%	6,9%	8,7%	7,8%	1,1%
Hálvársrenting av eginogn aftaná skatt / Half-year return on equity after tax	5,0%	5,6%	7,1%	6,4%	0,9%
Inntøka pr. útreiðslukrónu / Income/Cost ratio	2,72	2,77	2,99	2,75	1,20
Ognaravkast fyri hálvárið / Return on assets by half-year	1,0%	1,1%	1,4%	1,1%	0,2%
Marknaðarváði / Market risk ratios					
Rentuváði / Interest rate risk	0,9%	0,8%	0,8%	1,2%	1,3%
Gjaldoyrastøða / Foreign exchange position	3,8%	3,1%	2,3%	1,2%	4,2%
Gjaldoyraváði / Foreign exchange risk	0,1%	0,1%	0,0%	0,0%	0,1%
Gjaldføri / Liquidity ratios					
Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán / Loans, advances and impairments in proportion to deposits	91,0%	88,9%	86,8%	87,0%	87,0%
Gjaldføri eftir LCR / Liquidity Cover Ratio (LCR)	227,7%	236,2%	238,5%	210,7%	189,5%
Lánsváði / Credit risk ratios					
Stór viðskifti í mun til grundkapital / Large exposure as percentage of capital base	115,4%	120,7%	120,6%	123,1%	124,3%
Tap og niðurskrivingar í prosentum / Write-offs and impairments ratio	-0,2%	-0,1%	-0,1%	-0,1%	0,0%
Útlán í mun til eginognina / Total loans in proportion to equity	3,4	3,5	3,4	3,6	3,6
Útlánsvøkstur / Increase of loans	4,8%	5,8%	0,5%	6,6%	3,8%

01

Leiðslufrágreiðing

Management Review

Í stuttum / Highlights



Úrslitið farna hálvár er eitt avlop á 255,3 mió. kr.

The result for the first half of 2026 is a profit of DKK 255.3 million

Samtakið hevur útlán fyri 9.699 mió. kr.

The Group's lending book amount to DKK 9,699 million.



Samtakið hevur lánsbrøv fyri 3.880 mió. kr.

The Group has bonds at a value of DKK 3,880 million.



Ogn knýtt at tryggingar-sáttmálum fyri 2.844 mió. kr

Assets under insurance contracts amount to DKK 2,844 million.



Samtakið hevur innlán fyri 10.795 mió. kr.

Deposits amount to DKK 10,795 million.



Skuld knýtt at tryggingar-sáttmálum eru 3.376 mió. kr.

Liabilities under insurance contracts amounts to DKK 3,376 million.



Eginognin er 4.925 mió. kr.

Equity accounts for DKK 4,925 million.



Solvensurin við hálvárið er 39,7%

Solvency ratio is 39.7%.



Úrslitið fyri 2026 aftaná skatt fer væntandi at liggja millum 400 til 460 mió. kr.

The result for 2026 is expected to be a profit after tax in the range of DKK 400 to 460 million.

Leiðslufrágreiðing / Management Review

Úrslitið hjá Betri P/F samtakinum í fyrra hálvári í 2026 vísir eitt avlop á 255,3 mió. kr. aftaná skatt og hetta er betri enn mett varð við árslok 2025.

Samtakið metti við árslok 2025, at ársúrslitið fyri 2026 fór at liggja millum 260 og 340 mió. kr. aftaná skatt. Góða gongdin í fyrra hálvári 2026 merkir, at samtakið væntar, at ársúrslitið aftaná skatt verður betur enn áður mett og verður millum 400 og 450 mió. kr.

Fyri fleiri av feløgunum hava úrslitini í fyrra hálvári verið betri enn mett og eru orsøkirnar økt virksemi, samstundis sum færri skaðar hava verið. Íløguvirksemi hevur samanumtikið eisini verið betur enn upprunaliga mett.

Fyri tey einstøku dótturfeløgini verður vísst til umrøðuna av dótturfeløgunum niðanfyri.

Annað virksemi hjá samtakinum, fevnir um virksemi hjá móðurfelagnum, sum í stóran mun knýtir seg at íløguvirksemi.

Dótturfeløgini

Peningastovnsvirksemið í samtakinum, Betri Banki, hevur 141,0 mió. kr. í avlopi aftaná skatt í fyrra hálvári í 2026. Úrslitið er nakað betri, enn bankin metti við árslok 2025.

Fleiri orsøkir eru til hetta. Eitt nú er útlánsvirksemi økt meira enn væntað, og tí eru rentuinntøkurnar eisini hægri enn upprunaliga mett. Harnæst hava kundarnir yvirskipað ikki havt trupulleikar av at halda sínar lániskyldur, og tí hevur bankin afturføringar av niðurskrivingum í fyrra hálvári í 2026.

Bankin hevur í fyrra hálvári 2026 netto rentu- og ómaksgjøld á 260,2 mió. kr., og er hetta nærum tað sama sum við hálvárið 2025. Útlánini eru meira enn eina hálva milliard hægri við hálvárið 2026 enn við hálvárið 2025, men rentustøði hevur verið lægri í 2026 enn í 2025.

Bankin hevur haft afturføringar á 20 mió. kr í fyrsta hálvárið 2026 og knýta hesar afturføringar seg til eitt tal av størri kundum har grundarlagið er blivið betur. Rakstrarkostnaðurin hjá bankanum er øktur eitt vet fyrra hálvár 2026 í mun til fyrra hálvár 2025, og er orsøkin m.a. at sáttmálabundnu lønirnar hækkaðu 1. mai og at bankin ger ábøtur á nakrar bygningar.

Útlán bankans, sum við ársenda 2025 vóru 9.226 mió. kr., eru í fyrra hálvári 2026 vaksin við umleið 443 mió kr., svarandi til umleið 4,8%. Innlán bankans eru økt í fyrra hálvári 2026 til áljóðandi 10.887 mió. kr. Innlánini eru sostatt 1.219 mió. kr. hægri enn útlánini ultimo juni 2026. Eginognin ultimo juni 2026 er á 2.838 mió. kr.

Skaðatryggingarvirksemið hjá samtakinum hevði eitt avlop á 76,1 mió. kr. aftaná skatt í fyrra hálvári 2026 og er hetta betri enn mett varð við árslok 2025.

Tryggingarvirksemið hjá Betri Trygging farna tíðarskeið vísir eitt tryggingartekniskt avlop á 65,1 mió. kr., ímóti einum avlopi á 34,4 mió. kr. sama tíðarskeið undanfarna ár. Veðrið hevur háttað sær væl í fyrra hálvári og tí eru skaðar orsakað av veðri færri í tali enn undanfarin ár.

Íløguvirksemið gav eitt betri úrslit, um samanborið verður við fyrra hálvár 2025. Íløguúrslitið í fyrra hálvári 2026 gevur eitt avlop á 25,6 mió. kr. móti einum avlopi á 7,2 mió. kr. í fyrra hálvári í 2025.

Pensjóns- og lívstryggingarvirksemið hjá samtakinum, Betri Pensjón, hevur eitt avlop á 6,9 mió. kr. aftaná skatt í fyrra hálvári 2026, og hetta er nøkunlunda, sum mett varð við endan av 2025.

Tryggingarvirksemið hjá Betri Pensjón farna tíðarskeið vísir eitt tryggingartekniskt avlop á 3,8 mió. kr., móti einum tryggingartekniskum úrsliti á 5,9 mió. kr. sama tíðarskeið undanfarna ár, og hetta er nøktandi. Betri Pensjón hevur enn eina støddd, sum merkir, at smá sveiggj kunnu gera av, hvørt úrslitið vísir avlop ella hall.

Annað virksemi hjá samtakinum hevur tilsamans ein vinning á 31,7 mió. kr. aftaná skatt. Hetta virksemið hjá samtakinum stavar í høvuðsheitum frá íløguvirksemi. Kursjavningarnir í fyrra hálvári 2026 vísa eitt avlop á góðar 26,9 mió. kr., móti einum halli á góðar 28,5 mió. kr. í fyrra hálvári 2025. Nettorentu- og ómaksgjøldini eru áleið tað sama fyrra hálvár 2026 sum fyrra hálvár 2025.

Eigaraviðurskifti

Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á., eigur allan kapitalpartin í Betri P/F og einasta virksemi í Ognarfelag Tryggingartakaranna er at eiga partabrøv í Betri P/F. Endamálið hjá Betri P/F er at eiga partabrøv í øðrum feløgum, umsita peningaognir og reka fíggjarvirksemi v.m., eiga og reka fasta ogn o.t. og allan handil í hesum sambandi.

Virksemi

Alt virksemi hjá Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á. fer fram í dótturfelagnum Betri P/F og í dótturfeløgunum hjá Betri P/F.

Betri P/F eigur hesi dótturfeløg:

- Betri Trygging P/F, ið rekur skaðatryggingarvirksemi. Eginogn 868,7 mió. kr.

- Betri Pensjón P/F, ið rekur lívs- og pensjónstryggingarvirksemi. Eginogn 90,6 mió. kr.
- Betri Banki P/F, ið rekur peningastovnsvirksemi. Eginogn 2.838,3 mió. kr. Betri Banki eigur dótturfelagið Betri Heim, ið rekur húsameklaravirksemi. Eginogn hjá Betri Heim er 14,9 mió. kr.
- Betri Íløgur Sp/F, sum rekur íløguvirksemi. Eginogn 90,0 mió. kr.

Samtakið fevnir um skaðatrygging, lívstrygging, pensjón, peningastovnsvirksemi og íløguvirksemi.

Starvsfólkatalið við hálvárið 2026 er 295 starvsfólk.

Eitt sterkt samtak

Fíggjarstøðan hjá samtakinum javnvigar við 19,5 mia. kr. og er eginognin á 4,9 mia. kr.

Við hálvárið 2026 var solvensurin hjá samtakinum 39,7% í mun til minsta kravið á 8%.

Óvissa um innrokning og virðisáseting

Virðisásetingar av ávísum ognum og skyldum eru grundaðar á roknskaparligar metingar, sum leiðslan hevur gjørt í samsvari við nýttan roknskaparhátt og við støði í søguligum royndum og fyritreytum. Leiðslan metur at ásetingarnar eru ráðiligar og veruleikakendar.

Í notu 1, nýttur roknskaparháttur hjá samtakinum, er neyvari lýsing av óvissum um innrokning og virðisáseting.

Hendingar eftir roknskaparlok

Umframt tey viðurskifti, sum eru nevnd í frágreiðingini, er einki óvanligt farið fram.

Útlitini

Virksemið í føroyska búskapinum er framvegis høgt. Arbeiðsloysið er sera lágt, starvsfólkatalið og fólkatalið halda fram at vaksa, og bæði lønargjaldingarnar og útflutningsvirðið eru økt munandi. Samstundis eru tó tekin um, at vøksturin er viknaður nakað í ávísum pørtum av búskapinum, meðan hækkandi orkuprísir aftur hava lagt trýst á inflatiónina.

Brúkaraprístalið er hækkað 2,4% seinasta árið, og prísvøksturin í mai var tann hægsti síðan 2024. Nýggjastu inflatiónstølini benda tó á, at prísvøksturin aftur er farin at minka nakað. Hóast hetta hava bæði Evropeiski Meginbankin og Danmarks Nationalbank hækkað leiðandi renturnar við 0,25 prosentstigi, tí inflatiónstrýstið framvegis verður mett at vera ov høgt. Føroysku peningastovnarnir hava fylgt hesum rentuhækkingunum og hækkað útláns- og innlánsrenturnar samsvarandi.

Arbeiðsmarknaðurin er framvegis sera sterkur við vaksandi starvsfólkatali og arbeiðsloysi á bert 0,9%. Lønargjaldingarnar eru vaksnar við 6,7%, og útflutningsvirðið av fiskavørum er vaksið við 14,3%. Samstundis vísa húsarhaldsálitið og kortnýtslan, at virksemið í føroyska búskapinum framvegis er høgt, meðan fíggjarliga støðan hjá húsarhaldunum er batnað, stuðlað av lønarhækkingum og teimum rentulækkingum, sum vórðu framdar í 2024 og 2025.

Búskaparráðið metir, at bruttotjóðarúrtøkan fer at vaksa við 6,2% í 2026, har privata nýtslan og útflutningurin verða fremstu drívmeginirnir. Útlitini fyri tilfeingisvinnuna eru framvegis góð, og betri prísir á pelagiskum fiskasløgum og laksi kunnu styrkja útflutningsvirðið enn meira.

Altjóða útlitini eru tó vorðin óvissari orsakað av geopolitiskum spenningi, hækkandi orkuprísum og hægri rentum, sum kunnu dempa búskaparliga virksemið komandi árini. Hóast hetta eru útlitini fyri føroyska búskapin framvegis jalig. Tí er framvegis tørvur á varsemi, serliga í mun til kostnaðarstøði, arbeiðsmegi, bústaðarmarknað og gongdina á altjóða marknaðum.

Gongdin í samtakinum er tengd at gongdini í dótturfeløgunum og harvið gongdini í føroyska búskapinum.

Útlitini hjá einstøku feløgunum

Rentubroytingar saman við skaðagongd hava stóra ávirkan á úrslitið hjá samtakinum.

Seinasta árið hava leiðandi renturnar verið lækkaðar fleiri ferðir, og føroysku peningastovnarnir hava samsvarandi lækkað bæði útláns- og innlánsrenturnar. Í juni 2026 hækkaðu tó bæði Evropeiski Meginbankin og Danmarks Nationalbank leiðandi renturnar við 0,25 prosentstigi. Føroysku peningastovnarnir hava síðani fylgt hesum rentuhækkingunum og tillagað útláns- og innlánsrenturnar samsvarandi. Um rentustøðið verður varðveitt á hesum støði, verður væntað, at hækkingin fer at hava eina jaliga ávirkan á rentuinntøkurnar hjá samtakinum seinna hálvár 2026.

Betri Banki P/F metti við árslok 2025, at ársúrslitið aftaná skatt fyri 2026 fór at vísa eitt avlop millum 180-220 mió. kr. Góða gongdin í fyrra hálvári, við góðum íløguúrslitum og avmarkaðum tapum á útlánum merkir, at bankin broytir metingina soleiðis, at metta úrslitið fyri 2026 fer at liggja millum 270-290 mió. kr. aftaná skatt.

Skaðagongdin higartil í ár hevur verið betri, enn tað sum mett er við vanlig ár, men yvirskipa verður ikki mett, at tær stóru broytingarnar koma í seinna hálvári í mun til tað sum áður er mett.

Betri Trygging P/F hevði í fyrra hálvári 2026 ein vøkstur í tryggingargjøldunum fyri egna rokning, og væntandi heldur hendan gongdin fram í seinnu helvt av 2026.

Men heilt avgerandi fyri úrslitið er skaðagongdin, og fyrra hálvár 2026 hevur eisini havt við sær eina lækking í samlaðum skaðaendurgjøldunum. Hóast óvissu um skaðagongdina í seinna hálvári, verður mett, at skaðaendurgjøld fyri egna rokning, verða sum væntað við ársbyrjan. Betri Trygging broytir met-

ingina, sum var gjørd við ársbyrjan, har mett varð, at ársúrslitið aftaná skatt fyri 2026 fór at vísa eitt avlop millum 50 og 80 mió. kr. til eitt mett úrslit fyri árið millum 70 og 100 mió. kr.

Úrsliti fyri fyrra hálvár 2026 hjá Betri Pensjón P/F er nakað betri enn mett varð við ársbyrjan. Betri Pensjón P/F metti við árslok 2025, at ársúrslitið aftaná skatt fyri 2026 fór at vísa eitt avlop millum 4 og 8 mió. kr. Talan eru tó ikki um stór frávik og samanumtikið heldur Betri Pensjón fast við metingina, sum var gjørd við ársbyrjan, har mett varð, at ársúrslitið aftaná skatt fyri 2026 fór at vísa eitt avlop millum 4 og 8 mió. kr.

Annað virksemi, sum í høvuðsheitum fevnir um raksturin av Betri P/F og Betri Íløgum Sp/F væntast at geva eitt úrslit aftaná skatt millum 50-60 mió. kr. í 2026.

Góða gongdin í fyrra hálvári 2026 merkir, at samtakið væntar at ársúrslitið aftaná skatt verður betri enn áður mett og fer at liggja millum 400 og 460 mió. kr.

Summary

The Group's net result for the first half of 2026 is a profit after tax of DKK 255.3 million. The Group's main activities are conducted through its underlying subsidiaries, which are referred to for further details. These subsidiaries are listed on page 4.

The Group's performance exceeded expectations set at the beginning of the year. Several factors contributed to this outcome, with the primary drivers being increased business activity, favourable claims development, and stronger-than-expected investment performance.

The result from banking activities amounts to DKK 141.0 million, which is higher than anticipated. This strong performance is primarily due to higher lending activity than expected, resulting in stronger net interest income, together with reversals of loan impairment charges, as customers generally continued to meet their financial obligations.

At year-end 2025, Betri Banki projected a profit after tax of DKK 180–220 million for 2026. Based on the favourable developments in the first half of the year, the Bank has revised its outlook and now estimates a profit after tax for 2026 in the range of DKK 270–290 million.

The non-life insurance activities deliver a profit of DKK 76.1 million, significantly higher than in the same period last year and above expectations. The technical result shows a strong profit, supported by favourable weather conditions, which resulted in fewer weather-related claims than in previous years. Investment performance also improved compared with the first half of 2025.

Considering this development, Betri Trygging has revised its outlook for 2026 and now expects a profit after tax in the range of DKK 70–100 million, compared with the previous estimate of DKK 50–80 million.

The pension and life insurance segment generates a profit of DKK 6.9 million for the first half of 2026, which is considered satisfactory. However, due to Betri Pensjón's relatively small size, even minor fluctuations can significantly affect the result. Consequently, the forecast for the full year 2026 remains unchanged.

Other activities within the Group, largely related to investments and the management of underlying companies, report a profit after tax of DKK 31.7 million in the first half of 2026. This represents a significant improvement compared with the same period last year, primarily driven by positive fair value adjustments and improved investment performance.

As of the end of the first half of 2026, the Group's balance sheet totals DKK 19.5 billion, with shareholders' equity amounting to DKK 4.9 billion.

The Group's solvency ratio at mid-year 2026 is 39.7%, significantly above the minimum regulatory requirement of 8%.

The outlook for the second half of 2026 will continue to depend on developments within the Group's subsidiaries, as well as economic conditions in the Faroe Islands and global financial markets. Although the international outlook has become more uncertain due to geopolitical tensions, higher energy prices and rising interest rates, the outlook for the Faroese economy remains positive.

At the end of 2025, Management forecast a profit after tax of DKK 260–340 million for 2026.

Following the strong developments in the first half of the year, Management has revised its expectations and now anticipates a profit after tax in the range of DKK 400–460 million for 2026.

02

Roknskapur

Financial statement

Rakstrarroknskapur / Income Statement

Nota	DKK 1.000	Samtak / Group		Ognarfelag Tryggingartakaranna	
		1H 2026	1H 2025	1H 2026	1H 2025
2	Rentuinntøkur / Interest income	277.193	283.483	0	0
3	Rentuútreiðslur / Interest expenses	-35.982	-37.544	0	0
	Rentuinntøkur netto / Net interest income	**241.211**	**245.939**	**0**	**0**
	Vinningsbýti av partabrøvum v.m. / Dividends on shares, etc.	20.760	17.604	0	0
4	Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur / Fee and commission income	32.411	30.845	0	0
	Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir / Fee and commission expenses	-1.963	-2.502	0	0
	Rentu- og ómaksgjøld netto / Net interest and fee income	**292.419**	**291.886**	**0**	**0**
	Tryggingargjøld fyri egna rokning / Premium income, net of reinsurance	292.524	273.592	0	0
	Skaðaendurgjøld fyri egna rokning / Claims, net of reinsurance	-155.864	-177.091	0	0
	"Rentu-, ómaksgjøld og trygging netto / Interest and fee income and income from insurance activities, net"	**429.079**	**388.387**	**0**	**0**
5	Virðisjavnan / Fair value adjustments	45.780	-22.398	0	0
	Aðrar vanligar inntøkur / Other operating income	7.457	7.062	0	0
6	Útreiðslur til starvsfólk og umsiting / Staff costs and administrative expenses	-197.388	-187.936	0	0
	Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum / Depreciations and impairments of intangible and tangible assets	-3.952	-2.696	0	0
	Aðrar rakstrarútreiðslur / Other operating expenses	-279	-27	0	0
7	Niðurskrivingar av útlánum og aðrari ogn / Impairment of loans advances, receivables etc.	24.648	15.116	0	0
	Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum / Income from associates and subsidiaries	4.002	3.848	255.300	166.730
	Úrslit áðrenn skatt / Profit/loss (-) before tax	**309.345**	**201.357**	**255.300**	**166.730**
	Skattur / Tax	-54.045	-34.627	0	0
	Úrslit / Net profit/loss (-) for the period	**255.300**	**166.730**	**255.300**	**166.730**
	Býtið av úrslitinum / Allocation				
	Úrslit / Net profit for the period			255.300	166.730
	At ráða yvir tilsamans / Total amount available for allocation			**255.300**	**166.730**
	Flutt til grunn eftir innaravirðisháttinum / Equity method reserve			255.300	166.730
	Nýtsla av úrsliti / Total allocation			**255.300**	**166.730**

Nota	DKK 1.000	Samtak / Group		Ognarfelag Tryggingartakaranna	
		1H 2026	2025	1H 2026	2025
	Fíggjarstøða / Balance sheet				
	Ogn / Assets				
	Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn hjá tjóðbankum / Cash in hand and demand deposits with central banks	953.023	982.153	0	0
8	Áogn í lánistovnum og tjóðbankum / Claims on credit institutions and central banks	338.399	354.366	0	0
9	Útlán og onnur ogn til amortiseraðan kostprís / Loans and other claims at amortised cost	9.698.893	9.229.618	0	0
	Lánsbrøv til dagsvirði / Bonds at fair value	3.880.119	3.809.799	0	0
	Partabrøv / Shares	1.233.090	1.118.401	0	0
	Ogn knýtt at tryggingarsáttmálum / Assets under insurance contracts	2.843.987	2.571.125	0	0
	Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum / Investments in subsidiaries	0	0	4.924.829	4.733.893
	Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum / Investments in associates	172.982	175.641	0	0
	Óítøkiligar ognir / Intangible assets	14.584	15.349	0	0
	Grundøki og bygningar tilsamans / Total land and buildings	**267.135**	**269.963**	**0**	**0**
	Íløgubygningar / Investment properties	67.874	67.874	0	0
	Fyrisitingar- og deildarbygningar / Domicile properties	199.261	202.089	0	0
	Onnur ítøkilig ogn / Other tangible assets	10.307	10.566	0	0
	Verandi skattaogn / Current tax assets	745	372	0	0
	Onnur ogn / Other assets	38.708	49.372	0	0
	Tíðarskeiðsavmarkingar / Prepayments	28.779	39.074	0	0
	Ogn tilsamans / Total assets	**19.480.751**	**18.625.799**	**4.924.829**	**4.733.893**

